# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*»Hava vit undan komandi kappingarári dómarar, sum eru komnir nær teimum 15.000 kr., so er tað púrasta sjálvsagt, at hesir tá steðga við at døma«*

*Hartvig Joensen, formaður í Hondbóltsdómarafelagnum*

# Lógarsmiðir hótta ítróttardøming

**Ein broyting, sum í desember varð framd í skattalógini, hóttir við at geva ítróttini mest sum katastrofalar avleiðingar. Serstakliga innan døming**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fram til 31. desember í fjør vórðu dómarar innan ítrótt samsýndir við skattafríari veiting, sum varð heimilað í skattalógini. Tann heimildin hevur tó onga tíð verið so øgiliga greitt staðfest í lógini, og tí hevur frá ítróttinum verið arbeitt við at fáa skipanina legaliseraða. Eitt arbeiði, sum nú tykist hava givið alvorligan baksláttur.

## 15.000 kr. er markið

Í nýggju lógini eru nevnliga tvey mørk ásett, um talan er um skattafríar veitingar.

Leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum kunnu nú fáa upp til 10.000 kr. um árið í skattafríari veiting. Markið hjá dómarum, linjuverjum og venjarum er nú sett til 15.000 kr.

Fyri venjarar og hjálparfólk er talan um stóran bata. Gamla markið í lógini var nevnliga 4.000 kr., og var hetta ikki dagført í drúgt áramál.

Men fyri dómarar og linjuverjar er talan mest sum um vanlukkuliga støðu. Talan var kanska um grásonu í gomlu lógini, har 2.000 kr. stóð sum markið fyri dómarar, men í stóran mun fingu hesir eina upphædd, sum svaraði til endurgjald fyri ferðaútreíðslur. Í øllum førum varð hetta tulkingin hjá ítróttinum, men eitt veruligt skattamál kundi kanska tulkað hesar reglur øðrvísi.

## Einki endurgjald

Vanlukkan í dag er tó ein onnur. Tí í nýggju reglugerðini verður staðfest, at tað ikki er loyvt at endurrinda dómarum, venjarum, hjálparum og øðrum fyri ferðaútreiðslur. Tað vil siga, at koyripengar, tunnilsgjald v.m. ikki longur kunnu endurrindast, men skulu flytast yvir skattaskipanina. Eitt lógarsmíð, sum í besta føri kann tulkast sum óheppið, tí í øllum øðrum samfelagsviðurskiftum er tað so, at arbeiðstakari kann fáa endurgjald fyri tær beinleiðis útreiðslur, sum hesin hevur av arbeiði sínum.

## FSF ikki hoyrt

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur, at hann er alt annað enn nøgdur um framferðina í málinum.

- Vit hava sjálvir verið í sambandi við Toll- og Skattstovuna um málið, tí vit duga væl at síggja, at gamla lógin gav nakrar grásonur.

- Men vit hoyrdu einki sum helst aftur, fyrr enn lidna lógaruppskotið kom fyri tingið. Tá royndu vit at sleppa á fund um málið, men boðini úr Fíggjarmálaráðnum vóru púrasta greið. Teir høvdu gjørt ein leist saman við Toll- og Skattstovuni, og hesum mátti ítrótturin bara laga seg eftir, varð sagt.




*Dómarar eru ein partur av spælinum, men ei broyting í skattalógini hóttir nú við at leggja alla ítróttardøming í oyði*

TOYOTA

Til bilasølu okkara leita vit eftir einum starvsfelaga at taka lut í søluarbeiðinum.

Bilasølan á Reyni Service, ið er ein av landsins størstu, umboðar bilamerkini Toyota og Lexus. Haraftrat umboðar fyritøkan Castrol smyrjiolju og Tidy Car konseptið til reingerð av bilum.

Fyri at styrkja um tænastustigið, søknast vit eftir einum íðnum persóni, ið hevur royndir við sølu og tænastuveitingum. Viðkomandi fer at kunna gera sær galdandi í menninginí av søluliðinum, eins væl og støðugu dagføringini av fyritøkuni.

Vit bjóða eitt professionelt arbeiðsumhvørvi við hartilhoyrandi avbjóðingum og frælsi. Afturfyri rokna vit við, at uppgávurnar verða loystar til fulnar og at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt og samstundis vera partur av einum toymi.

Persónliga ert tú fyrikomandi, dámar væl at fáast við fólk, at leiðbeina, ráðgeva og at kunna taka eina støðu, ið tekur støði í gerandisdegnum hjá kundanum.

Sølufólkið verður lønt eftir nærri avtalu. Meira upplýsing um starvið fæst við at venda sær til Eivind á Reyni á tlf. 353040.
Umsókn, við viðkomandi skjølum, ið skal verða okkum í hendi innan 1. Apríl, skal sendast til:

Reyni Service
Ronny í Lon ella Eivind av Reyni
Vegurin Langi
188 Hoyvík

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

TOYOTA

Til plátuverkstaðin sóknast vit eftir einum lærlingi at byrja skjótast til ber.

Plátuverkstaðurin umvælir nærum allar plátu og karossarískaðar

Lærlingurin fær breiða og holla upplæring í upprætting av buglum, bonkarbeiði og annað ísamband við skaðaarbeiði á einum av landsins størstu verkstaðum. Lærutíðin umfatar tekniskan skúla og verktligt arbeiði undir eftirliti av einum læru-meistara.

Vit leggja dent á gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Hinvegin krevja vit, at starvsfólk í størst møguligan mun, kunnu arbeiða sjálvstøðugt samstundis sum tey eru partur av einum toymi, har aðalmálið er valaverk til ein nøgdan skara av viðskiftafólki.

Eru spurningar um lærplássið til starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Páll av Teiginum ella Eivind av Reyni. Umsóknir skulu innan 1. Apríl sendast til:

Reyni Service
Páll av Teigum ella Eivind av Reyni.
Vegurin langi
188 Hoyvík

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F